Kunngerðablaðið A

2009 Hefti 20

ISSN 0907-905X

Nr. 100 17. juli 2009

**Fráboðan**
**um**
**at broyta fráboðan um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýrismenninar**

Í fráboðan nr. 84 frá 30. september 2008 um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýrismenninar sum broytt við fráboðan nr. 100 frá 20. november 2008 verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 1 stk. 1 verður gjørd tann broyting at „Hans Pauli Strøm, Javnaðarflokkurin, Vestmanna..“ fer úr embæti sum landsstýrismaður í heilsumálum. Í hansara stað kemur „Aksel V. Johannesen, Javnaðarflokkurin, Tórshavn.“

2) Í § 8 nr. 5 b verður í staðin fyri orðini „tvíliðaðar samráðingar og avtalur um fiskivinnu og skattaviðurskifti,“ sett: „samráðingar og avtalur um skattaviðurskifti og samráðingar um fyrisitingarligar sáttmálar viðvíkjandi fiskirættindum umframt fundir um fiskirættindi, ið fara fram í NEAFC.“

3) § 13 nr. 1 verður strikað.

4) § 14 nr. 37 verður strikað.

5) Sum nýtt nr. 65 í § 14 verður sett: „Ll. nr. 1 frá 22. desember 2008 um gjaldførislán frá Føroya Landsstýri til Ríkisstjórn Íslands.“

6) Sum nýtt nr. 66 í § 14 verður sett: „Ll. nr. 40 frá 28. apríl 2009 um lántøku til landskassan“.

7) Sum nýtt nr. 67 í § 14 verður sett: „Ll. nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan.“

8) Sum nýtt nr. 68 í § 14 verður sett: „Ll. nr. 50 frá 11. mai 2009 um Búskaparráð.“

9) Sum nýtt nr. 69 í § 14 verður sett: „Ll. nr. 71 frá 25. mai 2009 um at seta í gildi skattaavtalur millum Føroyar og ávikavist Guernsey og Jersey.“

10) Sum nýtt nr. 24 í § 20 verður sett: „24) Ll. nr. 129 frá 22. desember 2008 um at høvuðsumvæla, útbyggja og nútíðargera Landssjúkrahúsið.“

11) Sum nýtt nr. 25 í § 20 verður sett: „25) A. nr. 185 frá 13. marts 2009 om ikrafttræden for Færøerne af lov om anvendelse af tvang i psykiatrien § 29, § 34, § 36 stk. 4 og § 39 stk. 2.“

12) Sum nýtt nr. 8 í § 28 verður sett: „Sbr. Ll. nr. 54 frá 11. mai 2009 um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum: Upphavsrættur.“

13) § 29 verður strikað.

14) Í § 32 nr. 4 verður sett afturat § 8 stk. 1: „§ 15 stk. 2 og § 44.“

15) § 32 nr. 11 verður strikað.

16) Í § 32 nr. 14 b verður í staðin fyri orðini „tvíliðaðar samráðingar og avtalur um fiskivinnu.“ Sett: „samráðingar um fyrisitingarligar sáttmálar viðvíkjandi fiskirættindum umframt fundir um fiskirættindi, ið fara fram í NEAFC.“

17) § 36 nr. 5 verður strikað.

18) § 37 nr. 16 verður strikað.

19) § 37 nr. 33 verður strikað.

20) Í § 37 verður sett sum nýtt pkt. 51a): „51a) Ll. nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing“

21) § 37 nr. 87 verður strikað.

22) Sum nýtt nr. 97 í § 37 verður sett: „97) Ll. nr. 45 frá 11. mai 2009 um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir (grannskoðaralógin).“

23) Sum nýtt nr. 98 í § 37 verður sett: „98) Ll. nr. 67 frá 25. mai 2009 um trygging móti avleiðingum av arbeiðsskaða (Arbeiðsskaðatryggingarlógin).“

24) Sum nýtt nr. 99 í § 37 verður sett: „99) Ll. nr. 73 frá 25. mai 2009 um at hækka partapeningin í P/f Fiskaaling.“

25) Sum nýtt nr. 100 í § 37 verður sett: „100) Ll. nr. 74 frá 25. mai 2009 um elektroniska undirskrift.“

26) Sum nýtt nr. 101 í § 37 verður sett: „101) Ll. nr. 83 frá 25.mai 2009 aling av fiski v.m.“

27) Í § 40 nr. 3 verður sett afturat orðinum „sjórættur“: „og loðslógarøki“.

28) § 43 nr. 25 verður strikað.

29) Sum nýtt nr. 31 í § 43 verður sett: „31) Ll. nr. 48 frá 11. mai 2009 um studningslán til ellis- og røktarheim og eldrasambýli“.

30) Í § 49 verður sett sum nýtt pkt. 5a): „ 5a) L. nr. 55 af 27. marts 1903 om foranstaltninger mod udbredelse af rustsvampe, sbr. ræðislógini § 2.“

31) Sum nýtt pkt. 11a) í § 49 verður sett: „11a) L. nr. 73 af 23. marts 1932 om midler til bekæmpelse af plantesygdomme m.m., sbr. ræðislógini § 2.“

32) Sum nýtt pkt. 14a) í § 49 verður sett: „14a) L. nr. 370 af 21. december 1938 for Færøerne om bekæmpelse af smitsomme plantesygdomme og skadedyr, sbr. ræðislógini § 2.“

33) Sum nýtt pkt. 32a) í § 49 verður sett: „Lb. nr. 565 af 28. august 1986 om ydelse af juridisk bistand samt om inkasso- og detektivvirksomhed m.v., som den er sat i kraft ved L. nr. 92 af 23. februar 1988, sbr. ræðislógini § 2.“

34) § 49 nr. 69 verður strikað.

35) Sum nýtt pkt. 71) í § 49 verður sett: „Ll. nr. 43 frá 4. mai 2009 um at væla um Brúnna um Streymin.“

36) Sum nýtt pkt. 72) í § 49 verður sett: „Ll. nr. 51 frá 11. mai 2009 um vegføring oman fyri Skálafjørð.“

37) Sum nýtt pkt. 73) í § 49 verður sett: „Ll. nr. 58 frá 25. mai 2009 um tunlar norður um Fjall við tilhoyrandi vegum.“

38) Sum nýtt pkt. 74) í § 49 verður sett: „Ll. nr. 61 frá 25. mai 2009 um at gera partafelag at gera fast samband um Skopunarfjørð.“

39) Sum nýtt nr. 13 í § 51 verður sett: „Sbr. Ll. nr. 53 frá 11. mai 2009 um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum: Fíggjarrættur (formueret).“

40) § 52 nr. 2 verður strikað.

41) Í § 52 nr. 12 gongur út orðið „Loðslógarøki,“

42) Sum nýtt stk. 6 í § 56 verður sett: „Stk. 6. § 43 nr. 2 og § 49 nr. 16 fara úr gildi 1. januar 2011.“

**§ 2**

Fráboðanin fær gildi dagin eftir at hon er kunngjørd, tó fór Hans Pauli Strøm frá sum landsstýrismaður við gildi frá 14. juli 2009 og Aksel V. Johannesen tók við 17. juli 2009.

Løgmansskrivstovan, 17. juli 2009

**Kaj Leo Johannesen (sign.)**
løgmaður

/Marjun Hanusardóttir (sign.)

Nr. 101 20. juli 2009

# Kunngerð um útgjald til fiskimenn, tá ið skip teirra verða løgd vegna umvælingar

Við heimild í § 20a, stk. 2 í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997, um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 79 frá 25. mai 2009, verður ásett:

*Fiskimannaskipan*

**§ 1.** Fiskimannaskipanin verður í hesi kunngerð nýtt sum hugtak fyri ta skipan, sum fevnir um rættindi og skyldur hjá teimum fiskimonnum, sum koma undir treytirnar í hesi kunngerð.

*Skip, fevnd av kunngerðini*

**§ 2.** Bert fiskiskip, sum hava veiðiloyvi sambært løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, koma undir hesa kunngerð. Veiðiloyvið sambært løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap hava øll fiskifør onnur enn útróðrarbátar undir 15 tons á húkaveiðu.

**§ 3.** Fiskiskipið skal vera lagt vegna umvælingar, sum gera, at skipið liggur, og skulu hesar umvælingar ikki vera fevndar av inntøkutapstrygging.

*Fiskimenn*

**§ 4.** Bert tann fiskimaður, sum er við einum fiskiskipi sambært §§ 2 og 3, kann fáa arbeiðsloysisstuðul eftir hesi kunngerð.

*Stk. 2.* Tað er ein treyt fyri útgjaldi, at fiskimaðurin hevur verið við skipinum, áðrenn skipið fer til umvælingar, og at hann hevði verið við skipinum, um skipið ikki fór til umvælingar, og at hann ætlandi skal við skipinum, eftir at umvælingarnar eru av.

*Stk. 3.* Tað er ein treyt fyri útgjaldi, at fiskimaðurin hevur verið og eftir ætlan verður mynstraður sambært Ll. nr. 67 frá 9. juni 1988 um mynstring, við seinni broytingum.

*Rætturin til útgjald*

**§ 5.** Fiskimaður fevndur av hesi kunngerð fær útgoldið arbeiðsloysisstuðul aftaná 30 dagar frá tí, at umvæligararbeiðið er byrjað. Goldið verður í mesta lagi fyri 60 útgjaldsdagar í sambandi við hvørja einstaka umvæling. Arbeiðsloysisskipanin ger av, um talan er um eina ella fleiri umvælingar.

*Stk. 2.* Fyri hvørjar kr. 1000, sum útrokningargrundarlagið hjá fiskimanninum fer uppum upphæddina nevnda í § 16, stk. 2 í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, minkar útgjaldið við 0,5% stig.

*Tøkur á arbeiðsmarknaðinum*

**§ 6.** Fiskimaðurin skal, hóast setanarliga tilknýtið til arbeiðsgevaran ikki er av, vera tøkur á arbeiðsmarknaðinum sambært reglunum í kunngerð um útgjald v.m. av arbeiðsloysisstuðli.

*Aðrar reglur*

**§ 7.** Viðvíkjandi umsókn um arbeiðsloysisstuðul, treytir fyri stuðli, avgreiðslu av útgjaldi, øðrum inntøkum og reglunum annars eru reglurnar í løgtinglóg um arbeiðsloysistryggin og arbeiðsávísing og í kunngerð um útgjald v.m. av arbeiðsloysisstuðli galdandi við teimum tillagingum, sum eru náttúrligar.

**§ 8.** Arbeiðsloysisskipanin kann krevja neyðugar upplýsingar í sambandi við viðgerð av umsóknum um arbeiðsloysisstuðul. Arbeiðsloysisskipanin kann krevja at hesar upplýsingar verða váttaðar av øðrum t.d. reiðara ella skipasmiðju.

*Gildiskoma*

**§ 9.** Hendan kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið, 20. juli 2009

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/Arne Poulsen (sign.)

FØROYAPRENT